## Vanrøkja sleðuhundar

Síðani danska Ekstrablaðið herfyri skrivaði, at nógvir grønlendskir sleðuhundar verða vanrøktir, hevur heimastýrið í Nuuk fingið eitt ótal av mótmælum úr øllum Norðurlondum. Skrivingin hevur eisini vakt stóran ans í Grønlandi, og nú hevur Siverth K. Heilmann, landsstýrismaður í vinnumálum, heitt á borgarstjórarnar kring landið og biðið teir síggja til, at sleðuhundarnir fáa ta viðferð og umsorgan, sum teir sambært lógini eiga at fáa.

## Dýrt krím

Vanliga er tað í januar, februar og mars, at krímsjúkurnar gera um seg, og í Noregi hava tey nú roknað út, hvussu nógv tann árliga krímtíðin kostar samfelagnum. Útrokningin vísir, at næstan 27 mió. dagsverk ella 117.000 ársraverk fara fyri skeyti á hvørjum ári orsakað av krími. Tað er sjey prosent av øllum ársverkum. Umroknað til pengar merkir tað, at krímið kostar arbeiðsgevarunum einar 220 mió. krónur hvønn arbeiðsdag.

# Skemtilig løta um álvarsmál

**Tað er ikki hvønn dag, at føroysk børn hoyra um flóttafólk úr Afrika. So tá ið Lotte Holmen og Bjørn Kroll frá altjóða hjálparfelagsskapinum Adra hildu fyrilestur um evnið á Adventistaskúlanum, var tað ikki eiti á spurningar, ið børnini høvdu**

BARNAFYRILESTUR

*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*



*Børnini sótu hugagóð og lurtaðu eftir hjálparfelagsskapinum Adra í Adventistaskúlanum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

-Eru bara svørt fólk í Afrika? Hvussu turka tey sær, tá tey hava verið á wc?,Eru húsini líka ljót innan, sum tey eru uttan? Hví kavar ikki í Afrika?

Jú, Lotte Holmen og Bjørn Krøll høvdu hendurnar fullar, tá ið tey hildu fyrilestur fyri børnunum á Adventistaskúlanum um neyðstødd flóttafólk. Tey royndu eftir besta førimuni at svara, og børnini sótu hugtikin og hugdu eftir ógvusligu myndunum, ið komu á skýggjan. Børn við byrsum í hond, hungurstungin fólk, fátækar kroysur; alt myndir, ið ikki eru partur av hugaheiminum hjá einum føroyskum barni. Og hetta fekk børnini at lurta.

Ein lærarari var millum annað sera bilsin av, at børnini høvdu megnað at siti still so leingi.

-Tey hava sitið her síðani kl 9, og nú tveir tímar seinni, hava tey enn spurningar. Hetta er ordiliga stuttligt.

### Skemtiligt og tó

Hóast løtan tyktist skemtilig, so var tað skjótt eyðsæð, ikki einans fyri okkum vaksnu men eisini fyri børnunum, at hetta var eitt álvarsmál, ið Adra, sum er altjóða hjálparfelagsskapurin hjá Adventistakirkjuni, var komin til Føroya við. Spurningarnir hjá børnunum gjørdust alt meira álvarsligir, eins og málið fór at snúgva seg alt meira um, hví øll børn ikki kunnu hava tað líka gott sum í Føroyum. Til dømis vildi ein lítil drongur hava at vita, hví børnini í Afrika vórðu so fátøk.

-Hetta er júst tí, at vit ferðast runt ymsum londum. Fyri at fáa fólk tilvitað um, at tað eru ikki øll, sum hava tað so gott, og at øll kunna veita eina hjálpandi hond, sigur Lotte Holmen.

### Lata alt frá húsum til 150 krónur

Størsta tiltakið, ið Adra er farin í gongd við, er at lata hús til flóttafólk, eitt nú í Burundi og Congo. Men fyri børnum kann hetta kanska tykjast at verða ein sindur ógvuslig uppgáva, so ístaðin valdu Lotte og Bjørn heldur at vísa á, at ein gáva, ið fyri okkum kann tykjast lítil, kann gera sera nógvan mun.

-Um tit nú ístaðin fyri at fara í Burger King og keypa eitt talutíðarkort, lata tað til Adra, so kunnu vit geva ein heilan posa av lívsneyðugum tilfari til eina familju, segði Bjørn Krøll við børnini.

Onkur kann í øllum førum vænta sær eina gávu, tí lítli síðumaðurin hjá mær var ikki í iva.

-Eg fari heilt sikkurt heldur at lata pening, enn at keypa pening til fartelefonina í hesi vikuni.

# Gongur striltið við nýggjum flogfelag

**Starvsfólkið á Faroejet tók stríðið upp eftir at felagið fór í gjaldssteðg í desembur. Nú skuldi eitt nýtt flogfelag stovnast. Tá vórðu ætlaninar rættiliga óítøkiligar, og tað má sigast, at tær eisini eru í dag, tí enn vantar kapitalur, flogfar og flogsáttmálar**

FERÐAVINNA

*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

-Okkum manglar bara neyðuga kapitalin og eitt flogfar. Alt ber til, um vit fáa ein vegvísara, segði Oddmar á Høgabóli, fyrrverandi flogskipari á Faroejet, millum annað við Sosialin beint fyri jól í fjør. Tá høvdu fyrrverandi starvsfólk á Faroejet júst tikið eina avgerð um at stovna eitt nýtt flogfelag. Stór avbjóðing stóð fyri framman og bjartskygni merkti starvsfólkini.

Í dag eru tey eisini bjartskygd, og tey hava enn eina stóra avbjóðing fyri framman, men upprunliga ætlanin, tey høvdu fyri flogfelagið, er farin í vaskið.

- Uttan at koma alt ov nær inn á, hvør ætlanin var, so kann eg bara siga, at tað vórðu ymsar forðingar, ið gjørdu, at tann ætlanin ikki kom víðari. Nú hava vit eina nýggja ætlan, men hon er eisini so óítøkilig, at eg vil helst ikki siga nakað um hana beint nú, sigur Oddmar á Høgabóli.

### Møguligur flogsáttmáli á veg

Tað hendur okkurt av og á í væntandi nýggja flogfelagnum. Onkutíð eru heldur kvirrar tíðir, men møgulia nýggja flogfelagið er millum annað í samráðingum um ein rættiliga áhugaverdan flogsáttmála við eitt felag uttanlands.

-Hvat felagið er, vil eg helst ikki siga, men tað ljóðar spennandi, sigur Oddmar.

Tey sum onki hava, skulu onki fáa, og tey sum hava nógv, skulu fáa alt. Soleiðis verður mangan tikið til, og soleiðis er tað ofta hjá einum nýggjum felag. Trupulleikar eru í møguliga nýggja flogfelagnum, júst tí at tey byrja á so berum.

-Tá ein manglar kapital, er tað jú trupult at fáa flogsáttmálar og flogfør, men manglar ein flogsáttmálar og flogfør, so er jú trupult at fáa kapital. So tað er avgjørt ein stór avbjóðing, vit eru farin í holtur við, sigur Oddmar.

### Hanga enn í

Hóast alt tykist heldur trupult í løtuni, so vilja fyrrverandi starvsfólkini á Faroejet gjarna vísa á, at tey hanga enn í.

-Vit eru enn til, og vit stríðast enn fyri nýggja felagnum. Tað tekur langa tíð, men vit arbeiða jú fyri, at eitt nýtt føroyskt flogfelag kemur út úr hinum endanum, sigur Oddmar.

Hann gongur í løtuni uttan arbeiði, men hann ætlar sær ikki í løtuni at søkja um nýtt starv sum flogskipara í einum øðrum felag.

-Nei, tað ætli eg mær avgjørt ikki, tí eg trúgvi uppá, at vit fara at megna at stovna eitt nýtt felag, sigur Oddmar at enda.

# Lurta eftir Ettu Cameron og keyp eitt hús

**Í mars fer heimskendi gospel-, jazz og blues sangarin Etta Cameron at framføra í Føroyum. Hesaferð fer allur peningurin, ið kemur inn, beinleiðis til at byggja hús til flóttafólk og heimleys í Congo**

KONSERT

*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Um tú fert á konsert við heimskendu Ettu Cameron, tá ið hon kemur til Føroya í mars, ert tú beinleiðis við til at byggja hús til flóttafólk og heimleys í Congo. Tað er altjóða hjálparfelagsskapurin Adra, ið skipar fyri.

-Tað kostar einans 3200 krónur per hús, ið eru eini 40 fermetrar til støddar. Vit høvdu sama tiltak í Burundi í fjør, og tað var nærmast kapping um húsini, sigur Lotte Holmen, ið starvast hjá Adra í Danmark.

Etta Cameron stuðlar ofta teimum veikastu gjøgnum sín sang, og letur við gleði allan ágóðan av konsertunum í Føroyum til Adra. Konsertirnar, ið verða í mars, verða tvær í tali, onnur í Fuglafirði og hin í Tórshavn.